## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men njørki í støúm. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og um middagsleitið regn. Seinnapartin nakað minni vindur av suðri og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Rørslufundur í Klaksvík í kvøld

**Í hesari vikuni verður farið undir eina almenna fundarrøð kring landið um rørslu. Í kvøld klokkan 19.30 vitjar rundferðin í Klaksvík**

### RØRSLUÁRIÐ

Rørsluárið er fyri øll, ung sum gomul, kvinnur og menn, norðanfjørðs, sunnanfjørðs, ja øll. Tí verður nú skipað fyri almennum fundum um rørslu kring landið. Á fundunum fáa áhugað høvið at hoyra, hvussu vit kunnu fáa fólk at røra seg meira á arbeiðsplássum, barnagørðum, skúlum, ellisheimum og í frítíðin annars.

Lagt verður til brots í Tekniska skúla í Klaksvík týsdagin 28. apríl klokkan 19.30. Skráin er hendan:

- Hví Rørsluárið 2009? – Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum
- Kropslig venjing og heilsa – Magni Mohr, Phd í humanfysiologi
- Hvat ítróttafeløgini kunnu gera? – Sølvi Reinert Hansen, forseti í ÍSF
- Føroyar í rørslu: Nøkur dømi um ítøkilig átøk fyri at fremja rørslu í 2009
- Býarskipan og rørsla – Dávur Winther, Klaksvíkar Kommuna
- Eldri og rørsla – Benadicta Ellingsgaard og Martha Reyðberg, Nærverkið
- Rørsla á arbeiðsplássinum – Hákun Djurhuus, stjóri í SEV
- Rørsla hjá børnum og ungum í skúlum – Óli Jákup Joensen, skúlaleiðari
- Rørsla hjá børnum á dagstovnum – Tóra Johannessen, dagstovnaleiðari
- Kjak um, hvat kann gerast á staðnum

Haraftrat kemur landsstýrikvinnan í almannamálum, Rósa Samuelsen, at siga nøkur orð.

Tað eru Fólkaheilsuráðið og ÍSF, sum saman við landsstýrismanninum í heilsumálum, ið eru stigtakarar til rundferðina.

Almennu fundirnir eru ókeypis, siga Fólkaheilsuráðið, ÍSF og landsstýrismaðurin í heilsumálum, Hans Pauli Strøm.

FØROYAR Í RØRSLU




*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, fer á tiltakinum í Klaksvík í kvøld at greiða frá grundarlagnum fyri Rørsluárinum 2009*

## FAKTA

**Rundferðin »Føroyar í Rørslu«**
28. apríl: Klaksvík
30. apríl: Sandoy 4. mai: Suðuroy
5. mai: Eysturoy
6. mai: Vágar

*(Lesið meira á síðu 12)*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | -2 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 17 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 7 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 16 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 17 |
| New York | 31 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 33 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1019 hPa. við Eysturgrønland fer í landsynning.

**Komandi nátt:**
Hátrýstið yvir Norska Havinum fer spakuliga eystureftir. Lágtrýstið vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani stendur eisini í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/04 kl. 06⁰⁰ – 27/04 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,2°
Minsti hiti máldur í apríl: -8,7° - Mesti hiti máldur í apríl: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 26/04 kl. 06⁰⁰ – 27/04 06⁰⁰.
Avfallið higartil í apríl: 106 mm









## VESTFALLSKYRRINDI

25. apríl — Tendring
28. apríl — Mánin næstur jørðini
1. mai — Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. apríl | 09:57 | 22:26 | 08:57 | 21:26 | 09:12 | 21:41 | 11:57 | - | 00:30 | 12:57 | 08:12 | 20:41 | 07:12 | 19:41 | 10:12 | 22:41 | 11:12 | 23:41 | 09:42 | 22:11 | 10:57 | 23:26 |
| 29. apríl | 10:54 | 23:25 | 09:54 | 22:25 | 10:09 | 22:40 | 00:26 | 12:54 | 01:26 | 13:54 | 09:09 | 21:40 | 08:09 | 20:40 | 11:09 | 23:40 | - | 12:09 | 10:39 | 23:10 | 11:54 | - |
| 30. apríl | 11:54 | - | 10:54 | 23:21 | 11:09 | 23:36 | 01:25 | 13:54 | 02:25 | 14:54 | 10:09 | 22:36 | 09:09 | 21:36 | - | 12:09 | 00:40 | 13:09 | 11:39 | - | 00:25 | 12:54 |
| 1. mai | 00:21 | 13:01 | - | 12:01 | - | 12:16 | 02:21 | 15:01 | 03:21 | 16:01 | 11:16 | 23:56 | 10:16 | 22:56 | 00:36 | 13:16 | 01:36 | 14:16 | 00:06 | 12:46 | 01:21 | 14:01 |
| 2. mai | 01:41 | 14:19 | 00:41 | 13:19 | 00:56 | 13:34 | 03:41 | 16:19 | 04:41 | 17:19 | - | 12:34 | 11:34 | - | 01:56 | 14:34 | 02:56 | 15:34 | 01:26 | 14:04 | 02:41 | 15:19 |